# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 4

ISSN 0907-905X


Nr. 14 — 21. februar 2011

**Fráboðan**
**um**
**at broyta fráboðan um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar**

**§ 1**

Í fráboðan nr. 84 frá 30. september 2008 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 8 frá 19. januar 2011 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1 fer „Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin, Tvøroyri.“ úr embæti sum landsstýrismaður í fíggjarmálum, og í staðin kemur „Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin, Tórshavn“.

2) Í § 1, stk. 1 fer „Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin, Tórshavn“ úr embæti sum landsstýrismaður í heilsumálum, og í staðin kemur „John Johannessen, Javnaðarflokkurin, Tórshavn“.

3) Í § 39, nr. 8 verður aftan á orðið ársroknskaparlóggáva sett:
„, heruppií eisini um skipan av lutaíbúðafeløgum.“

4) Í § 45, nr. 1 verður aftan á „Húsaspurningar“ og áðrenn „, leiguspurningar“ sett:
„ (tó ikki um skipan av lutaíbúðafeløgum)“.

**§ 2**

Fráboðanin kemur í gildi 21. februar 2011.

Løgmansskrivstovan, 21. februar 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705